# Fekk onki at vita um ókeypis koyring

**– Landsverk átalar at hann, sum hevur ein part av ábyrgdini fyri ferðslutrygdini, onki fekk at vita um ætlanin at bjóða øllum at koyra ókeypis ígjøgnum undirsjóvartunlarnar í eina heila viku**

ÓKEYPIS KOYRING

*Áki Bertholdsen*
aki@sosialurin.fo




*Tey, sum hava ábyrgdina fyri trygdini, vórðu ikki eftirspurd, áðrenn leiðslan fyri undirsjóvartunlarnar bjóðaðu øllum at koyra ókeypis í eina heila viku. Tað átalar Landsverk, men løgreglan hevur ikki somu trupulleikar*

Tá ið leiðslan fyri undirsjóvartunnilin bjóðar øllum at koyra ókeypis ígjøgnum undirsjóvartunlarnar í eina heila viku, fer tað uttan iva at føra til sera nógva ferðslu.

Tí er tað eisini ein spurningur um, hvussu trygdin skal skipast, fyri at fáa alt at ganga, sum tað skal.

Men tey, sum hava ábyrgdina fyri ferðslutrygdini, fingu onki at vita um ætlanin at bjóða ókeypis koyring ígjøgnum undirsjóvartunlarnar í eina heila viku.

Og tað átalar Oyvindur Brimnes, stjóri á Landsverki.

Landsverk er ein av teimum stovnum, sum hava ábyrgdina av trygdini á føroysku vegunum, men hann fekk onki at vita um tað, at tað skuldi vera ókeypis koyring ígjøgnum undirsjóvartunlarnar í eina heila viku.

Sostatt er tað ikki í samráð við tey, sum hava ábyrgdina av ferðslutrygdini, at hendan ókeypis koyringin er fyriskipað.

Og sostatt hava tey, sum hava ábyrgdina av ferðslutrygdini, heldur ikki verið við til at leggja trygdina til rættis, fyrrenn nú, tað fræ ttist um tiltakið, nakrar fáa dagar áðrenn tað verður sett í verk.

– Tað er óheppið, at eitt slíkt tiltak verður fyriskipað, uttan at leiðslan fyri undirsjóvartunnilin tosar við okkum, sum hava ábyrgdina av ferðslutrygdini, sigur Oyvindur Brimnes.

Men hvørja støðu Landsverk hevði havt til eina slíka ætlan, vil Oyvindur Brimnes ikki siga nakað um.

Sosttatt vil hann ikki siga, um Landsverk yvirhøvur hevði viðmælt einum slíkum tiltaki ella um hann hevði viljað havt, at tað skuldi verðið skipað øðrvísi.

– Tað kann gera tað sama at tosa um tað nú, tí nú er tað sett í verk. Men eg kann bara siga, at tað átti ikki at verðið sett í verk, uttan í samráð við vegamyndugleikarnar og Løgregluna og tey, sum annars hava ábyrgdina av trygdini, sigur Oyvindur Brimnes.

Hann sigur, at eitt er, at tað verður ókeypis at koyra ígjøgnum tunlarnar. Eitt annað er, at tað verður ókeypis í eina heila viku.

–Tað ger, at tað fer at verða ein heilt óvanliga nógv ferðsla, tí tað er hugsandi, at stórt tal av fólki vilja sleppa ígjøgnum tunlarnar, áðrenn tað aftur fer at kosta nakað, leggur hann afturat.

## Hava tilbúgving

Men Landsverk staðfestir, at nú verður ókeypis koyring og sostatt gera tey tað, sum tey kunnu, fyri at tryggja ferðsluna.

Serliga er væntandi, at nógv ferðsla verður í Norðoyggjum og har eru nakrir serliga trongir fløskuhálsar og tað eru tunlarnir í Norðoyggjum.

Har eru tað bilarnir, sum koyra suðureftir, sum hava víkiskyldu.

– Vit hava koyrt alt strekki saman við løgregluni. Og fyri at tryggja ferðsluna, hava vit sett skelti uttanfyri tunlarnar norðanfyri, har vit boða frá, at tað skulu vera minst 100 metrar ímillum bilarnar, sum fara inn í tunlarnar norðaneftir.

Samstundis eru skelti sett upp, sum vísa á,, hvussu langt er ímillum bilarnar.

Hann sigur, at frástøðan ímillum bilarnar er sett til 100 metrar fyri tryggja, at tað altíð skal vera pláss at fara inn á eitt víkipláss.

Tí vónar hann, at bilarnir fara at virða skeltini.

Annars fer Landsverk at heita á Løgregluni um at fylgja gjølliga við ferðsluni ígjøgnum tunlarnar og at boða frá, taka trupulleikar seg upp.

– Vit hava eisini sjálvir eina tilbúgving og kunnu í eini handavending seta eina ljósregulering upp, so at tað bara verður loyvt at koyra annan vegin í ein álvan tíma og so aftur hin vegin í ein hálvan tíma, ella okkurt tílíkt.

Hann sigur, at virða bilførarar skeltini um at halda frástøðu, væntar hann ikki, at trupulleikarnir verða ov stórir, men verður tunnilin fullur av bilum, sum hvørki sleppa aftur ella fram, kann ein ljósregulering verða neyðug.

Hinvegin stúrir Landsverk ikki fyri at tað verður ov nógv gass í tunlunum, tí royndir vísa, at har er altíð rættiliga nógvur gjøgnumtrekkur.

## Loysa uppgávuna

Hinvegin hevur løgreglan ikki somu trupulleikar av hesum, sum Landsverk hevur.

Jón Klein Olsen á politistøðini í Havn, sigur, at løgreglan leggur seg ikki út í, um eitt slíkt tiltak verður fyriskipað ella ikki.

Men nú tað verður fyriskipað, fyrihalda vit okkum bara til tað og fara síðani at leggja til rættis, hvussu vit kunnu loysa uppgávuna at fáa ferðsluna at glíða og so brynjar løgreglan seg til tað.

Hann væntar, at størstu trupulleikarnir verða ikki av ferðini, men av nøgdini av bilum.

# Umráðandi at fólk brúka vit og skil

**Løgreglan í Klaksvík fær eykamanning at halda skil á ferðsluni í Norðoyggjum hetta vikuskiftið, men sýslumaðurin sigur eisini, at tað er umráðandi, at fólk brúka vit og skil**

FERÐSLA

*Áki Bertholdsen*
aki@sosialurin.fo

– Vit fara at gera, tað vit kunnu-og tað skal nokk ganga.

Hans Djurhuus, sýslumaður í Norðoyggin stúrir ikki, hóast hann væntar ógvuliga nógvar bilar í Norðoyggjar, nú Norðoyatunnilin letur upp.

Hann sigur, at løgreglan fer at gera, tað, sum stendur í hennara makt. Allir mans í Norðoyggjum eru tøkir og harafturat koma tvær motorsúkklur úr Havn og tær fara at koyra á vegunum í Norðoyggjum og ansa eftir ferðsluni út í eitt frá leygardegnum til sunnumorgunin.

– Nú er tað so fast samband, so skuldi tað verið neyðugt, ber eisini til at fáa eyka manning úr Eysturoy, ella úr Havn.

Annars hava summi stúrt fyri ferðsluni í Norðoyggjum, nú tað er ókeypis at koyra ígjøgnum tunlarnar. Serliga verður stúrt fyri ferðsluni í teimum einsporaðu tunlunum í Norðoyggjum, tí verður nógv ferðsla, er vandi fyri, at ferðslan stendur føst í tunlinum og standa tunlarnir fullir av bilum, er tað væl eisini ein trygdarspurningur.

Hans Djurhuus sigur, at ætlanin er ikki at hava serliga vakt við tunlarnar at leiðbeina ferðsluna ígjøgnum.

Hinvegin hevur Landsverk sett skelti upp norðanfyri tunlarnar, við boðum til bilførarar um at halda eina ávísa frástøðu.

Tað eru bilarnir, ið koma norðaneftir, ið hava víkiskyldu og fyri at tunlarnir ikki skulu typpast, er ætlanin við skeltunum, at tað skal altíð verða mikið langt ímillum bilarnar, ið fara inn í tunlarnar norðanífrá, at tað altíð skal vera pláss fyri teimum inni á víkiplássunum.

Halda bilarnir, ið koma norðaneftir, ikki frástøðuna, er vandi fyri, at tað ikki er pláss fyri teimum á víkiplássunum og so stendur ferðslan føst í t unlunum.

Tí vónar sýslumaðurin, at bilførarar akta boðini um at halda frástøðu fyri at sleppa undan trupulleikum.

Brúka bilførarar vit og skil, ber alt til, leggur hann afturat.



*Tað eru nógvir bilar væntandi í Norðoyggjar nú tunnilin letur upp, men sýslumaðurin, Hans Djurhuus, stúrir ikki fyri ferðsluni*